Álit

í

løgtingsmáli nr. 28/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um lestrarstuðul
(Broyting í javning av stuðulsupphæddum)

Landsstýrismaðurin í barna- og útbúgvingarmálum, Djóni Nolsøe Joensen, hevur lagt málið fram 29. september 2023 og eftir 1. viðgerð 6. oktober 2023 er tað beint Mentanarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 25. oktober og 1. november 2023.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við MFS og Ráð teirra lesandi á Fróðskaparsetrinum, landsstýriskvinnuna í fíggjarmálum, Ruth Vang, og landsstýrismannin í barna- og útbúgvingarmálum, Djóna Nolsøe Joensen, saman við Studna.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Sólvit E. Nolsø, Jóhannis Joensen, Súsanna Bertholdsen, Liljan Weihe og Erling Eidesgaard) hevur hesar viðmerkingar:

Lestrarstuðulin verður í løtuni javnaður einans við útgangsstøði í prosentvísu broytingini í miðalprístalinum. Seinast hann var javnaður var í august 2023, tá hann var javnaður við 7,7%, tí prístalið var so høgt. Hinvegin hevur prosentvísa broytingin í prístalinum seinastu árini verið ógvuliga lág, og tí er lestrarstuðulin ikki vaksin nakað nevnivert. Frá 2017 til 2022 lá prosentvísa broytingin millum 0,3% og 2,7%, meðan árini undan 2017 var vøksturin negativur, og tí var eingin javning av lestrarstuðulinum, so hann ikki minkaði.

Javning av almannaveitingum, sum ætlanin er at javnstilla javningina av lestrarstuðulinum við, er miðaltalið av broytingini í lønarkarminum hjá Fíggjarmálaráðnum og broytingini í prístalinum. Við at brúka ta skipanina at javna lestrarstuðulin eftir, heldur enn einans miðalprístalið, tryggjar mann sær, at javningin leggur seg í eina tryggari legu, og at lestrarstuðulin veksur ár um ár í samsvar við restina av almannaveitingunum.

Hóast lestrarstuðulin gjørdi eitt stórt lop seinast hann var javnaður, kann tað sum sagt koma fyri, at hann summi ár ikki verður javnaður, tí prístalsvøksturin er negativur ella í besta føri beint omanfyri null.

Tí loysir tað seg best fyri tey, ið fáa lestrarstuðul, at hann verður javnaður sum aðrar veitingar. Við tí eru tey tryggjaði eina meira skipaða og støðuga javning.

Broytingin merkir eina sparing næsta ár fyri landskassan, tí lestrarstuðulin verður ikki javnaður aftur fyri 1. januar 2025. Metta sparingin er 1,2 mió. kr.

Broytingin hevur tó eisini við sær, at hetta gerst ein økt útreiðsla fyri landskassan sum frálíður, tá broytingin er komin í gildi og lestrarstuðulin verður javnaður eins og almannaveitingarnar.

Við hesum viðmerkingum tekur meirilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Magnus Rasmussen og Bárður á Lakjuni) hevur hesar viðmerkingar:

Endamálið við uppskotinum er at javnstilla javningina av lestrarstuðlinum við javningina av almannaveitingum.

Nýskipanin hevur við sær, at javningin frameftir verður gjørd við útgangsstøði í miðal av prís- og lønarvøkstri undanfarna árið, og ikki eftir prosentvísu broytingini í miðalprístalinum fyri undanfarna ár í mun til miðalprístalið árið undan hesum, soleiðis sum galdandi lóg ásetur.

Nevndin hevur fingið upplýst, nevndarskjal B, hvussu gongdin hevur verið seinastu 20 árini við verandi leisti og so eisini sammett við ætlaða nýggja leistin. Her sæst heilt týðiligt, at nú nærum ongin inflasjón hevur verið í eini 20 ár, hava tey lesandi ikki fingið tað sama, sum lønarvøksturin hevur verið. Nú, tá væntast kann ein høg/vanlig inflasjón, verður skipanin broytt til, at lønarvøkstur verður vektaður við einari helvt.

Upplýst verður, at eingin javning verður 1. august 2024 og sparingin hjá landskassanum fyri 2024 verður mett til uml. 1,2 mió. kr.

Minnilutin heldur tað vera skeivt at broyta verandi lóg nú.

Fyrst verður eingin javning í 2024 og nú tá inflasjón er aftur, ætlar landsstýrið at broyta lóggávuna soleiðis, at tey lesandi ikki fáa kompenserað fyri príshækkingar. Hetta er ikki í lagi.

Heldur enn at broyta lógina, soleiðis at tey lesandi fáa minni nú, átti samgongan at givið teim lesandi eitt fíggjarligt lyft, nú tey onga hækking fáa frá 1. august 2024.

Minnilutin mælir til heldur at lata tey lesandi fáa fleiri pengar um hendi, nú nærum alt er vorðið dýrari, heldur enn at skerja tey fíggjarliga.

Við hesum viðmerkingum tekur minnilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Mentanarnevndin, 21. november 2023

Sólvit E. Nolsø formaður	Jóhannis Joensen næstformaður	Súsanna Bertholdsen
Liljan Weihe	Erling Eidesgaard	Magnus Rasmussen
	Bárður á Lakjuni	